Team 85 fekk fult viðhald

Føroya rættur staðfesti týsdagin, at Tjóðveldisflokkurin skal rinda lýsingarfyritøkuni, Team 85, góðar 300.000 kr

SAKARMÁL
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eitt av heilt nógv umtalaðu sakarmálunum her á landi endaði týsdagin, tá Føroya Rættur feldi dóm í málinum millum lýsingarfyritøkuna, Team 85 og Tjóðveldisflokkin.

Málið snýr seg um lýsingar, sum Team 85 hevði gjørt fyri Tjóðveldisflokkin til løgtingsvali á vári 2002. Ein av hesum lýsingunum var tann nógv umtalað lýsingin í Sosialinum sjálvan valdagin, har Lisbeth L. Petersen, Jóannes Eidesgaard og Hoygni Hoydal vóru framstillaði í ymsum variantum sum blanding millum føroyingar og danir.

Hendan lýsingin varð høvuðstátturin í sakarmálinum, tí Tjóðveldisflokkurin metti, at hendan hevði skatt lýsignarherferðina. Hartil metti flokkurin seg ikki hava skyldu at gjalda alla upphæddina, sum Team 85 hevði sent rokning fyri, tí samlaði kostnaðurin av hesum var hægri enn tað, sum partarnir høvdu avtalað fyri samlaðu lýsingarherferðina.

Rætturin hevur áður biðið partarnar um at finna semju í málinum, men tá hetta ikki var gjørligt, varð dómur nú feldur. Hesin staðfestir, at Tjóðveldisflokkurin skal rinda lýsingarfyritøkuni tær 241 tkr., sum Team 85 segði seg hava krav uppá. Hartil skulu rindast rentur av upphæddini umframt sakarmálskostnað. Samanlagt verður talan um góðar 300 tkr., sum Tjóðveldisflokkurin sostatt skal gjalda.

Johnny Gaard, stjóri á Team 85, varð í Sjónvarpinum týskvøldið endurgivin fyri at siga, at hann fegnaðist um dómin.

Sum tað framgongur aðrastaðni í blaðnum í dag, so sendi Tjóðveldisflokkurin týskvøldið út tíðindaskriv. Har verður staðfest, at flokkurin tekur við dóminum, men samstundis verður áhersla løgd á, at tey harmast um endan, sum málið fekk.

- Eg hevði høvdu vónað at vit fingu ein avsláttur í prísinum, tí vit halda okkum hava fingið eina sera ringa viðferð frá lýsingarfyritøkuni, og vit halda, at umrødda lýsingin hevur verið sera skaðilig fyri alt valstríðið og fyri flokkin. Men eg noyðist at taka dómin til eftirtektar og ásanna, at løgfrøðin sigur nakað annað, staðfestir Høgni Hoydal í skrivinum.

Tann so væl kenda lýsingin á valdegnum, sum var orsøk til sakarmálið

- Tað einasta eg kann fegnast um í hesum máli, er at málið nú er lýst til fulnar í einum dómi, og at vit við dóminum hava fingið eitt skjal sum greiðir frá allari gongdini við lýsingarátakinum og teirri nú so kendu lýsingini, sigur formaður Tjóðveldisfloksins at enda.

Í tíðindaskrivinum verður annars sagt, at flokkurin hevur avsett pening til eitt møguliga tapt sakarmál, og at upphæddin tí verður rindað Team 85 í næstum.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

BUSSFERÐ TIL HETLANDS

Nú hevur tú møguleika fyri at koma við á eina hugnaliga og áhugaverda bussferð til Hetlands. Farið verður av Havnini hóskvøld og komið verður aftur mánamorgun.

Fráferð av Havnini:..... hóskvøld 2. desember .....kl. 21.00
Koma Lerwick:..... fríggjadagin 3. desember .....kl. 12.00
Fráferð Lerwick:..... sunnudagin 5. desember .....kl. 13.30
Koma á Havnina:..... mánadagin 6. desember .....kl. 05.00

ÚTFERÐARMØGULEIKAR

Suðurmeginlandið – fríggjadag kl. 14.00 - 18.00
Á hesum túrinum er m.a. møguleiki at síggja Scalloway Castle, Sumburgh Head og Jarlshof, har nógvar forvitnisligar fornleivdir eru at finna.

Norðurmeginlandið – leygardag kl. 14.00 - 18.00
Á hesum túrinum er m.a. møguleiki at síggja Tingwall, Lunna Kirk, sum er elsta kirkjan í Hetlandi, ið framvegis er í nýtslu og hvussu hetlendingar gera sínar eyðkendu og vøkru prýðislutir.

Á heimferðini verður skipað fyri jólaborðhaldi og undirhaldi við HILMAR JAN og ROBERT. VESTMENN spæla og syngja

Prísur fyri hvønn úr 2.495,-

Íroknað er: Ferðin fram og aftur við Norrønu í 4-koyggjukamari við wc/bað, innan, 2 nætur í dupultkamari á Shetland Hotel við wc/bað. Á hotellinum er íroknaður morgunmatur og døgurði um kvøldið. Hartil føroyskur bussur, útferðir og føroyskt tosandi ferðaleiðari á útferðunum.

Pallborð fyri brúkarar

Brúkarasamtakið skipar fyri pallborðsfundi um brúkaramál í ÍSF húsinum í Gundadali hóskvøldið kl. 19.00

PALLBORÐ
Jákup Mørk

Tiltakið byggir á eina frágreiðing, ið er gjørd undir norðurlandaráðharraráðnum, og viðgerð skipan av brúkaraøkinum í Grønlandi, Íslandi og Føroyum. Víðari er tiltakið skipað sum ein partur av aðalfundinum, og er sostatt einans fyri limir og innboðin. Nýggir limir kunnu tó tekna seg við dyrnar, verður sagt.

Við pallborðið sita fyri Fólkaflokkin Óli Breckmann, fyri Sambandsflokkin Alfred Olsen, fyri Javnaðarflokkin John Johannesen, fyri Tjóðveldisflokkin Rubek Lilaa, fyri Sjálvstýrisflokkin Kári P. Højgaard, fyri Miðflokkin Bill Justinussen, fyri Vinnuhúsið Tummas Hanus Dam og fyri Brúkarasamtakið Erika Hayfield. Orðstýrari verður Turið Debes Hentze.

Kjakið fer at snúgva seg um hvussu føroyingar kunnu skipa sítt egna brúkaraøki við atliti til, hvussu gjørt verður í hinum útnorðurlondum.

Skal hækkast við 16,5 mió kr.

Kongshavnar Trolarafelag roknar við, at eginpeningur felagsins verður hækkaður við 16,5 mió kr.

ROKNSKAPUR
Jákup Mørk

Heldur ikki hjá Kongshavnar Trolarafelag gekst serliga væl í 2003.

Ársroknskapurin vísir eitt hall á 14,1 mió kr., og er hetta 5 mió kr. verri enn fyri 2002.

Eginpeningur felagsins var við árslok 2,7 mió kr., men sambært ársfrágreiðingini so verður arbeitt við at økja um hendan. Í frágreiðingini sigur leiðslan, at ætlandi skal eginpeningurin hækkast við 16,5 mió kr. Partvíst við kontantum innskoti og partvíst við skuldarumlegging.

Kongshavnar Trolarafelag eigur allan partapeningin í Sp/f Selberg og Sp/f Hvítabjørn. Hartil eigur felagið tveir triðingar av innskotspeninginum í P/F Føstuvarði.

Bilar

Nr. 206 • hósdagur • 28. oktober 2004 • 78. árg.

Nýggjur Fiat Punto í 2005

Tá ein nýggjur Fiat Punto kemur á marknaðin í 2005 verður tað við designi frá dugnaliga italska designaranum Giorgetto Giugiaro og í tøttum samstarvi við General Motors

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Núverandi Fiat Punto hevur verið ein av mest seldu bilum í sínum klassa í Evropa.

Komandi ár kemur ein heilt nýggjur Punto, sum verður gjørdur í tøttum samstarvi við General Motors. Av teimum 120 verkfrøðingunum sum tekna og designa bilin, eru teir 40 frá GM.

Róðurgreiðir, undirvognur, el-skipan, klimaanlegg, motorur, girkassi og bremsur vera felags við nýggja Opel Corsa, sum kemur í 2006. Tó koma Corsa og Punto ikki at líkjast í útsjónd.

Fiat Punto verður designaður av dugnaliga italska designaranum Giorgetto Giugiaro

Nýggi Punto, sum kemur á marknaðin í 2005, verður ein rúmligur og smartur bilur

Mercedes Vision B:

Mercedes í Golf-klassaunum

Mercedes-Benz sýndu konseptbilin Vision B fram á altjóða bilaframsýningini í Paris. Eftir ætlan skal bilurin koma á marknaðin einaferð komandi ár. Í stødd verður bilurin millum A og C klassan

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Mercedes kalla bilin Vision B Compact Sports Tourer (CTS). Eftir ætlan kemur Vision B á marknaðin einaferð komandi ár sum nýggi B-klassin

Mercedes kalla bilin Vision B Compact Sports Tourer (CTS).

Tað, sum vit vita um bilin, er, at hann hevur tvørliggjandi motor, og vit ganga út frá at hann, eins og tann minni A-klassin, eisini verður drivin av forhjólunum.

Bilurin verður 427 cm langur og 160 cm høgur. Nakað í somu stødd sum t.d. Renault Scénic og Mazda Premacy.

Vision B er ein 5-persónabilur við elegantum og smartum designi, eisini innan við eini eyðkendari Mercedes kabinu og sera góðum beinplássi bæði framman og aftan.

Eftir ætlan kemur Vision B á marknaðin einaferð komandi ár sum nýggi B-klassin hjá Mercedes-Benz.

Stilo á sølumiðstøðum

Fiat Stilo kann nú keypast í týsku Marktkauf sølumiðstøðunum, ið eitt dótturfelag hjá Edeka-handilsketuni. Kundin kann spara upp til 28 prosent við at keypa bilin frá Marktkauf

Kelda: Motor Magasinet

Mazda sølan vaks

Sølan av Mazda bilum í Evropa vaks við 20 prosentum í august. Hetta er 24. mánaðin á rað, at sølan av Mazda er vaksin í ES. Í Danmark vaks sølan við 41 prosentum í mun til í fjør

Kelda: Motor Magasinet

Hyundai og HM í fótbólti

Hyundai hava aftur nú gjørt avtalu við HM í fótbólti, sum verður í Týsklandi í 2006. Teir verða teirra almennu flutningsveitarar við meira enn 800 nýggjum Hyundai Tucson bilum

Kelda: Motor Magasinet